Kappingarráðið

**Reglugerð nr. 2 frá 20. juli 2012**
**um**
**fráboðan av samanleggingum**

Við heimild í § 16, stk. 3 í løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 2007 um kapping, sum broytt við Ll. nr. 35 frá 27 apríl 2012, verður ásett:

**§ 1.** Ein ella fleiri av luttakandi fyritøkunum í eini samanlegging skulu senda Kappingareftirlitinum fráboðan um samanleggingina sambært § 16, stk. 1.

**§ 2.** Ein samanlegging kann fráboðast eftir einfaldum ella vanligum leisti.
*Stk. 2.* Fráboðan eftir vanligum leisti skal, fyri at verða fullfíggjað eftir §17, stk. 1 í kappingarlógini, innihalda allar tær upplýsingar og skjøl, ið eru nevnd í skjali K2,.
*Stk. 3.* Fráboðan eftir einfaldum leisti skal, fyri at verða fullfíggjað eftir §17, stk. 1 í kappingarlógini, innihalda tær upplýsingar og skjøl, ið eru nevnd í skjali K2, pkt. 1-10,
*Stk. 4.* Fráboðarin kann koma við áheitan um, at fráboðan sbrt. stk. 2 og 3, verður javnsett við eina fullfíggjaða fráboðan, hóast ávísar av upplýsingunum nevndar í skjali K 2 ikki eru sendar inn. Í áheitanini skal grundgevast fyri, hví upplýsingarnar ikki eru neyðugar hjá Kappingarráðnum til tess at meta um samanleggingina.

**§ 3.** Samanleggingar kunnu fráboðast eftir einfaldum leisti, tá:
1) tvær ella fleiri fyritøkur fáa felagsræði á einum samváða(joint venture), ið ikki ella bert í avmarkaðan mun hevur virksemi í Føroyum.
2) ein fyritøka fær fult ræði á eini aðrari fyritøku, sum hon frammanundan hevur ræði á saman við øðrum.
3) tvær ella fleiri fyritøkur leggja saman, ella ein ella fleiri fyritøkur fáa eina- ella felagsræði við eini aðrari fyritøku, og tá ið:
   a. ongin av fyritøkunum virka á sama vørumarknaði og sama landafrøðiliga marknaði ella í seinna ella fyrra liði, ið er knýttir til ein vørumarknað, har onnur luttakandi fyritøka hevur virksemi, ella
   b. tvær ella fleiri av luttakandi fyritøkunum virka á sama vøru og landafrøðiliga marknaði, men hava tilsamans ein marknaðarpart í Føroyum, sum er minni enn 15%, ella
   c. ein ella fleiri av luttakandi fyritøkunum hava virksemi á einum seinni ella fyrri vørumarknaði til ein vørumarknað, har ein luttakandi fyritøka hevur virksemi. Ein fyritreyt er tó at hesar, hvør sær ella tilsamans, hava ein marknaðarpart í Føroyum, sum er minni enn 25%.
4) samanleggingar, sum koma undir fráboðanarskyldu eftir § 14, stk. 1, nr. 2.
5) samanleggingar, har luttakandi fyritøkur reka virksemi sum er fevnt av løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, við seinni broytingum.

*Stk. 2.* Hóast ein samanlegging er fevnd av teimum í stk. 1, nevndum førum, kann Kappingareftirlitið krevja at fráboðað verður eftir vanligum leisti, sbrt. § 2, stk. 2 í hesi reglugerð.

**§ 4.** Kappingareftirlitið upplýsir innan 8 yrkadagar eftir móttøku av vanligari fráboðan, sbrt. §2, stk. 2, um fráboðanin er fullfíggjað. Um Kappingareftirlitið metir, at fráboðanin er ófullfíggjað, gevur eftirlitið innan áður nevndu freist fráboðaranum boð um hetta, og ásetir hvørjar upplýsingar skulu latast og freistina fyri hesum. Ein fráboðan verður at rokna sum fullfíggjað tann dagin, tá ið Kappingareftirlitið hevur móttikið upplýsingarnar, ið biðið varð um.

*Stk. 2.* Einføld fráboðan, sbrt. § 2, stk. 3 verður mett at vera fullfíggja í seinasta lagi 8 yrkadagar eftir at Kappingareftirlitið hevur móttikið fráboðanina, um ikki Kappingareftirlitið áðrenn hevur givið boð um at fráboðast skal eftir vanligum leisti, sbrt. § 3, stk. 2. Kappingareftirlitið kann innan hesar 8 yrkadagar biðja um fleiri upplýsingar. Í so fall er fráboðanin at meta sum fullfíggjað, tá ið hesar eru móttiknar, tó í seinasta lagi 8 yrkadagar eftir, at fráboðað varð eftir einfaldum leisti.
*Stk. 3.* Hóast ein fráboðan eftir einføldum leisti er fullfíggjað, kann Kappingareftirlitið krevja at samanleggingin verður fráboðað eftir vanligum leisti, sbrt. § 2, stk. 2, so leingi sum samanleggingin ikki er góðkend.

**§ 5.** Metir Kappingarráðið, at ein transaktión, sum er fráboðað, ikki er fevnt av §13 í kappingarlógini, sbr. § 14, stk. 1, boðar ráðið fráboðara frá hesum. Fráboðarin kann síðan senda ráðnum umbøn um at fráboðanin verður viðgjørd eftir § 8, stk. 2, § 9, stk. 1, 1. pkt., § 11, stk. 2, 1. pkt., ella § 11, stk. 5. Tílík umbøn skal vera Kappingarráðnum í hendi 4 vikur eftir at boð eru givin eftir stk. 1, 1. pkt.
*Stk. 2.* Kappingarráðið kann krevja, at aðrar upplýsingar verða lagdar aftrat upplýsingunum í fráboðanini, um hetta er neyðugt til tess at kunna meta um viðurskiftini, sbrt. kappingarlógini § 8, stk. 2, § 9, stk. 1, 1. pkt, § 11, stk. 2, 1. pkt. ella § 11, stk. 5. Ráðið ásetir eina freist at lata inn hesar upplýsingar. Fráboðanin verður í slíkum føri at meta sum móttikin, tá ið transaktiónin var fráboðað sum ein samanlegging.

**§ 6.** Henda reglugerð kemur í gildi tann 20. juli 2012.
*Stk. 2.* Reglugerð nr. 2 frá 10. januar 2008 um fráboðan av samanleggingum, fer úr gildi sama dag.

Kappingarráðið, tann 20. juli 2012

Ingunn Ó. Eiriksdóttir
forkvinna

Terje Sigurðsson
deildarstjóri